

Jóannes Dalsgaard, deildarleiðari

Sjón-ar-mið





Hví fall Allende?

— eitt dokumenterað aftursvar til Óla Breckmann III

Vit hava nú sæð hvussu royndirnar hjá vinstrastjórn Allendes at føra ein aktivan og fólksgagnligan búskaparpolitikk vóru saboteraðar av chilenska miðalklassanum, útlendskum monopolfyritøkum og USA.

Vit skulu nú síggja hvussu støðan er í Chile í dag — tí Chile, sum sambært greinskriving Óla Breckmanns í Dagblaðnum er farið at blóma búskaparliga. Henda blóming kemur av, at fascistiska diktaturið hjá Pinochet hevur latið alla búskaparliga planlegging og fyriskipan uppí hendurnar á Chicago-økonominum Milton Friedmann og hansara búskaparligu lærusveinum (Dagblaðið 5/10 og 31/10-79)

Keldurnar til henda partin av aftursvarinum til Óla Breckmann eru bóklingurin Chilenske børn under fascismen og blaðið Chile information nr. 9.1979, samt Kristeligt Dagblad fyri aðru viku av oktober. Hesar keldur byggja mest á upplýsingar frá **Chilensku kirkjuni**, ið er einasti ikki-fascistiski stovnur, sum sleppur at virka toluliga óantastaður í dagsins Chile.

Fyrst eitt sindur um endamálið við búskaparpolitikkinum hjá Friedmann í Chile: Endamálið er fullkomiðliga at endurreisa harradømið hjá chilenska og útlendska stórkapitalinum, at avtaka nationaliseringarnar og leggja alt náttúrurikidømið hjá Chile í hendurnar á privatum. Eisini er endamálið at avtaka alla ta jarðarlóggávu, sum fyri fyrstu ferð í Chiles søgu hevur givið fjøldini úti á landsbygdini eina toluliga tilveru. Tað má viðgangast fult út, at hesin politikkur er eydnaður og tað er mikið møguligt, at hann sum Óli Breckmann sigur hevur fört til, at Chile nú er fört fyri at kappast við Japan og Vesturtýskland, men tær sosialu og búskaparligu fylgjurnar av hesum politikki hava verið og eru ræðuligar. Hetta skal verða víst við nøkrum dømum:

Sambært upplýsingum frá Solidaritetsstovni kirkjunnar koma 40% av øllum chilenskum børnum frá heimum, har tað er arbeiðsloysi, ella har forsyrgjarin bert hevur arbeiði við hvørt ella hoyrir til tey alralægst løntu.

Av hesum børnum eru 61,5% undirernørd og 20% av hesum eru beinleiðis svøltandi. Sum dømi verður nevnt, at sett varð á stovn eitt sanatorium fyri hungrandi børn. Frá tí løtu at børnini vóru útvald til sanatoriið kundi taka tey fyrstu 20 inn gekk ein mánaður. Í hesum tíðarskeiði doyðu 9 av børnunum í hungri.

Stórir flokkar av børnum reika um landið sum biddarar, kriminell ella eru noydd út í skøkjulevnað, sigur katólska kirkjan. Í 1977 vóru 30.653 heimleys børn tikin upp á gøtunum í Santiago. Av hesum vóru 65% millum 8 og 13 ár.

Eftir uppskoti frá Friedmann skal so nógv sum møguligt av øllum almennum virksemi yvir á privatar hendur.

Hetta hevur fört til øgiligar niðurskurðar innan heilsuverk og skúlaskap. T.d. eru útreiðslurnar til heilsuverkið skornar so nógv niður, at tær í dag bert eru 145 mill. dollars móti 353 mill. í t.d. 1970. Nú skal gjaldast fyri alla sjúkrahús-, læknaog jarðamøðurhjálp, heilsumiðstøðirnar í fátækrabýlingunum eru niðurlagdar og skipanin við ókeypis mjólk til børn og barnakonur er avtikin.

Niðurskurðarnir til skúlaskapin eru so umfatandi, at 40% av øllum børnum noydast út úr skúlanum aftaná 4. skúlaár. Øll víðari útbúgving er latin yvir á privatar hendur og skal gjaldast fyri hana. Hetta ger, at børn, sum ikki beinleiðis koma úr ríkmannaheimum hava yvirhøvur ongan møguleika at fáa hægri útbúgving. Men ikki nokk við tað: fyri stuttum upplýsti sjálvur Pinochet, at tað skjótt verður skipað so, at eisini **fólkaskúlin** skal verða goldin av foreldrunum og verður skúlagongd yvirhøvur tá bert fyri tey vælbjargaðu.

Húsa og íbúðarbyggingin, ið var ein hin best eydnaði partur av búskaparpolitikki Allendes er nú øll á reint privatum hondum. Hetta merkir, at tað ikki longur verða bygdar sosialar og almannagagnligar íbúðir og húsaneyðin er større enn nakrantíð.

Støðan hjá arbeiðarafjøldini

Formulin hjá Friedmann er, at gera Chile mattligt fyri tær multinationalu risafyritøkurnar. Hetta gerst best við at knasa fakfeløgini og harvið kroysta lønirnar niður í botn. Hetta er tíverri eydnast til fullnar, sum tað framgongur av hjástandandi talvu. Sum tað sæst eru lønirnar lægri í 1976 enn í 1970 mált í 1969-prísum.

Arbeiðsmannalønir í Chile um mánaðin (uppí hesum yvirliti er ikki roknað lønin hjá teim allralægst løntu, men hon er í løtuni 826 pesos (22 dollars) um mánaðin.

(í 1969 priser)	1000 pesos
1970	2.676
1971	4.565
1972	4.116
1973	2.886
1974	3.229
1975	2.429
1976	1.920

Kelda Chile information 9/9-79

Arbeiðsloysið er større enn nakrantíð í nýggjari tíð heili 20%.

Í hesum greinum havi eg við vilja ikki viðgjørt tey politisku viðurskiftini í Chile, men mest hildið meg til teir búskaparligu spurningarnar.

Tá Óli Breckmann tó í síni grein 5/10-79 roynir at fáa tað at síggja út sum tey politisku viðurskiftini í Chile eru batnandi, skal bert verða nevnt, at vesturlendsk bløð við góðum keldum í Chile, t.d. Kristeligt Dagblad, í oktober kundi upplýsa, at politiska kúgingin stendur við, og valdsgerðirnar eru eins ræðuligar og áður. Heldur er støðan versnað, við tað at juntain hjá Pinochet nú letur børn tortera. Hetta eru børn hjá foreldrum, sum eru undir illgruna fyri politiskt virksemi.

2500 fólk eru framvegis horvin, og talið á politiskum fangum er framvegis høgt — hvussu høgt er ilt at siga, tí nógv politiskt virksemi verður nú mett sum kriminelt. Tí verða nógvir politiskir fangar nú registreraðir sum kriminellir.

Niðurstøða

Eftir er nú ein spurningur, sum lesarar, veljarar og demokratiskt sinnað fólk kring alt Føroya land hevur sett sær sjálvum tann seinasta mánaðin: Hvat kann ein út frá Dagblaðsin skriving um Chile útleiða um Fólkafloksins støðu til heilt grundleggjandi samfelagsligar, moralskar og stýriskipanarligar spurningar í føroyska samfelagnum?

Eg fari til seinast í hesi grein at royna at svara hesum spurningi. Eg fari at gera mína niðurstøðu fult og heilt út frá tí, sum Dagblaðið hevur skrivað um Chile. Dagblaðsins skriving um hetta mál hevur verið kontant og opinskárað, tað er eingin grund til at snara nøkrum á ella leggja nakað afturat. Tað kann tykjast órættvíst út frá Dagblaðsins skriving at gera eina niðurstøðu um Fólkaflokkin. Ein má vóna, at nakrir fólkafloksmenn, eisini tingmenn, ikki taka undir við hesi skriving. Eftirsum hesir tó ikki hava latið við seg komið, má tað vera rimiligt at gera hesa niðurstøðu.

Henda meting fevnir um 1) Fólkafloksins støðu til tann sosiala spurningin, 2) Fólkafloksins støðu til innlendskt vinnulív mótvegis útlendskum risamonopolum, 3) Fólkafloksins støðu til okkara demokratisku stýriskipan og 4) Fólkafloksins trúverdigheit, hvat viðvíkur principiellum tjóðskaparspurningum.

1) Út frá Dagblaðsins skriving um Chile kann ein gera ta niðurstøðu, at Fólkaflokkurin styðjar ein politikk, sum — **ímóti fólksins vilja** — tekur støðið undan teimum sosialu høvuðskrøvum — einum sámuligum undirvísingarstigi, einari dyggari sjúkrarøkt, trygd fyri børn, trygd fyri gomul, trygd fyri sjúk og á annan hátt illa fyrikomin — sum verða sett til eitt líkinda samfelag.

2) Sum dokumenterað í hesi grein, stuðlaði Allende-stjórnin tí innlendska vinnulívinum ímóti at verða køvt ella kollrent av útlendskum risamonopolum. Mótvegis hesum politikki hevur Pinochet-juntain — aftur **ímóti fólksins mandati** — givið útlendsku risamonopolunum fríar teymar. At tað verða innlendskar fyritøkur og handilsmenn, sum lúta í hesi kapping, er greitt og prógvað. Fólkaflokkurin tekur undir við hesum seinna politikkinum. Tað skuldi ikki verið torført út frá hesum hjá tjóðskaparhugaðum føroyingum og fólki, ið ynskir at styðja **føroyskan** ídnað og **føroyskt** privat initiativ, út frá hesum at gjørt sær eina meting um Fólkaflokkin sum álit hjá føroyskum vinnulívsmonnum.

3) Hvat ið viðvíkir Fólkafloksins støðu til okkara demokratisku stýrisskipan, so er um hetta at siga, at annaðhvørt heldur tú tær demokratisku spælireglurnar, ella gert tú tað ikki, her er eingin millumvegur. Tú kanst ikki í fyrsta viðbragdi kalla teg demokrat og í øðrum viðbragdi fegnast um, at ein demokratiskt vald stjórn verður kollrend og ein demokratiskt valdur forseti skotin. ANNAÐHVØRT gongur tú undir ta treyt, at tann sosialt-tjóðskaparligi, vinnulívsstimbrandi politikkurin hjá Allende verður settur í verk, **við fólksins mandati** og kallar teg demokrat. ELLA styðjar tú tað, at tann antin-sosiali og antinationali politikkurin hjá Pinochet verður settur í verk, **ímóti fólksins mandati** — og er **ikki** demokratur.

4) Allende og stjórn hansara vórðu feld av monnum, sum vóru til reiðar at seta ynskini og gagnið hjá chilendska fólkinum til viks til fyrimun fyri ynskini og áhugamálini hjá risafyritøkum í einum fremmandum, figgindaliga sinnaðum landi. Í seinasta parti av endurminningum sínum kallar chilenski yrkjarin Pablo Neruda hesar menn fyri »landasvíkjarar«. Hetta er ein rætt og saklig meting. Pinochet og hansara menn vóru og eru landasvíkjarar — eins og t.d. Quisling var tað. Teir sviku chilenska fólkið, chilenska demokratiið og chilenska vinnulívið. Hvørja niðurstøðu ein út frá tí, at Fólkaflokkurin fegnast um slíkar menn, kann gera sær um Fólkaflokksins demokratiska og nationala stirðil í føroyska samfelagnum, ja, hetta liggur so beint fyri fótunum, at eg haldi, lesarin dugir at leggja tvey og tvey saman uttan mína hjálp.

Jóannes Dalsgaard
Tvøroyri